# Vit eru ikki komin uppí fyri at avhøvda nakran

*Tað hevur verið stórvask í Havnar Handverkarafelag. Men nýggja nevndin ætlar sær ikki í hernað ímóti teimum, sum mannaðu nevndina áðrenn, sigur nývaldi formaðurin í Havnar Handverkarafelag*



ÁKI BERTHOLDSEN

–Vit ætlað okkum ikki at avhøvda nakran.

– Men tað var neyðugt at rudda út - og nú verður neyðugt at rudda upp.

Tað sigur Eli Brimsvík, nývaldur formaður í Havnar Handverkarafelag.

Tað hevur verið stórvask í handverkarafelagnum í Høvuðsstaðnum.

Í fyrstu syftu førdi tað við sær, at allir nevndarlimirnir løgdu frá sær.

Á aðalfundinum boðaði nevndin frá, at legði formaðurin ikki frá, fór nevndin at gera tað.

Men formaðurin var ikki at vika og hesum tóku hinir nevndarlimirnir so avleiðingarnar av, og søgdu seg frá.

Í aðru syftu førdi tað við sær, at formaðurin varð koyrdur frá.

Tað hendi á einum eykaaðalfundi seinasta vikuskiftið

Sostatt eru tað nú fimm nýggir mans, sum manna nevndina í Havnar Handverkarafelag. Umframt formannin, eru teir Einar Bech, næstformaður, Jakobus Kamminga, Bjarni Petursson og Palli Djurhuus.

### Sett eina millión í oljuvinnuna

Kravið um stórvask í Havnar Handverkarafelag kom eftir at tað varð avdúkað, at ymisk óregluligt var farið fram viðvíkjandi peningaligu viðurskiftunum hjá felagnum.

Nýggi formaðurin vil ikki siga so nógv um, hvat hetta snúði seg um. Men hann váttar, at eitt, sum fráfarandi nevndin gjørdi, var at seta eina góða millión krónur í partapengum í Føroya Kolvetni.

– Tað er púra greitt, at tað hevði nevndin ikki heimild til, tað haldi eg, at vit hava fingið heilt greitt at vita. Í øllum førum er tað moralskt heilt av leið.

Hann váttar eisini, at fráfarandi formaðurin hevur eisini keypt ein skutara, sum felagið nú eigur.

*–Okkara endamál er fyrst og fremst at fáa felagið at virka, sum tað eigur at virka og vit ætla okkum ikki æi hernað ímóti gomlu nevndini ella formanninum. Tí er ein sak avgjørt ikki tað, sum liggur okkum fremst í huganum.*

*– Men tað var neyðugt at rudda út- og nú er neyðugt at rudda upp, sigur nývaldi formaðurin í Havnar Handverkarafelag, Eli Brimsvík.*

Hvussu nógv nevndin annars visti um alt hetta, er ivasamt, men alt tað verður sjálvnadi eisini kannað.

Annars vil hann ikki útgreinað, hvat hesi óregluligu viðurskiftini snúgva seg um.

Men hann váttar tó afturat, at bókhaldið hevur verið í so leyðsligt.

### Ætla ikki at avhøvda

Men Eli Brimsvík leggur dent á, at nýggja nevndin í Havnar Handverkarafelag ætlar sær ikki í eina herferð ímóti teirri gomlu nevndini, ella gamla formanninum.

– Vit síggja tað ikki sum okkara endamál at avhøvda nakran, ella at fáa nakran partout stillaðan til svars fyri tað, sum er hent.

– Men eftir at hetta var komið fram, var tað neyðugt at fáa nýtt fólk til.

Og fremsta endamál okkara nú, er nú at fáa fulla greiði á viðurskiftunum.

– Vit halda, at fyri at koma víðari, er tað neyðugt at greiða fløkjuna og at fáa fult yvirlit yvir støðuna.

Eli Brimsvík sigur, at tí verða øll skjøl nú gjøgnumgingin so at full greiða fæst á, hvussu støðan er, og, hvat er farið fram.

– Og aftaná, at tað er fingið frá hondini, er okkara endamál at reka felagið soleiðis, sum tað eigur at verða rikið.

So má tíðin vísa, um nakað annað skal henda.

– Men at gera sak burturúr er avgjørt ikki tað, sum liggur fremst í huganum.

### Óstøðug viðurskifti

Hetta er aðru ferð í fá ár, at øll leiðslan í Havnar Handverkarafelag verður skift út.

Nevndin, sum sat í fleiri ár, steinsvav, og tí varð hon koyrd frá.

– Fyri nøkrum árum kom so ein nýggj nevnd framat or rætt skal vera rætt: Hon hevur fingið nokk so fitt á skaftið.

Eitt nú gjørdi formaðurin eitt sera gott arbeiði til frama fyri ein pensjónsgrunn, sum er eitt stórt framstig hjá limunum.

Eli Brimsvík sigur, at hann tí harmast um, at tað skuldi enda soleiðis.

– Men sum støðan nú varð vorðin, var onki annað at gera, uttan at fáa nýtt fólk framat, leggur hann afturat

Sostatt kann staðfestast, at enn einaferð uppá heilt fá ár, hevur ein kvettlíknandi støða ført við sær, at heilar nevndir í Havnar Handverkarafelag eru koyrdar frá.

Fyrst var tað nevndin hjá Høgna Højgaard, sum varð koyrd frá av nevndini hjá Eyðfinni Petersen fyri 3-4 árum síðani.

Og nú var tað so aftur nevndin hjá Eyðfinni Petersen, sum varð koyrd frá.

Vit hava spurt nývalda formannin, um hann hevur nakra meting av, hví viðurskiftini í Havnar Handverkarafelag eru so ruðuleikakend, afturímóti øðrum fakfeløgum, sum tykjast at verða avbera væl skipað.

Hann heldur, at tað er tí, at felagið hevur ikki verið nóg væl skipað.

– At vera handverkari merkir ikki, at tú hevur skil fyri fíggjarstýring, bókhaldi og fyriskipan.

–Og tað haldi eg hevur verið tann stóri veikleikin hjá felagnum, at tey, sum hava havt dagliga raksturin um hendi, hava ikki havt neyðugt innlit í hesi viðurskifti.

Hann sigur, at tað hevur nevndin, sum nú er, tikið avleiðingarnar av, og hevur sett ein dagligan leiðara.

Dagligi leiðarin er Johanna Hansen, sum hevur eina fortíð á skrivstovuni hjá Meistarafelagnum

– Ein dagligan leiðara hava hini fakfeløgini, sum eru væl skipað og tað eiga vit eisini at hava, sigur Eli Brimsvík.

### Tikið annað við sær

Hann sigur, at tað hevur sera stóran týdning, at tað verður friður í Havnar Handverkarafelag, og at viðurskiftini verða fingin í rættlag, so at felagið kann verða rikið, sum tað eigur.

Hann sipar til, at felagið er eisini limur í Landsfelag Handverkaranna og har er bæði felagið í Vági og á Tvøroyri uppi í.

– Vit hava ikki bara okkum sjálvi at hugsa um.

– Fór Havnar Handverkarafelagið fyri bakka, er stórur vandi fyri, at tað hevði tikið hini bæði feløgini við sær í fallinum.

Hann leggur afturat, at í fyrstu syftu fær nevndarskiftið onga ávirkan á viðurskiftini við Føroya Handverkarafelag.

– Aðalfundur í felagnum hevur meldað okkum úr Føroya Handverkarafelag.

– Og tað krevst aðalfundarsamtykt at melda okkum upp í aftur. Men sjálvandi eiga vit at hava góð viðurskifti við Føroya Handverkarafelag og at draga somu línu sum tey, tí vit hava felags áhugamál, sigur nývaldi formaðurin í Havnar Handverkarafelag.

# Flota nýggjan bát í dag

*Í dag fáa vágbingar eisini at vita, hvat Stóra Pakkhús skal brúkast til*

ÁKI BERTHOLDSEN

Í kapproðrinum í summar fara vágbingar at royna seg við einum nýggjum tíggjumannafari, sum Kaj Hammer hevur smíðað.

Og klokkan trý ídag verður hesin nýggi kapproðrarbáturin, sum eisini eitur „Vágbingur", flotaður av Garðabrúgv.

Í hesum sambandi flytur Jógvan Krosslá býráðsformaður fram røðu og møguleiki verður fyri at keypa kaffi og kakur.

Tá ið Vágbingur er flotaður fer gentu- og dreingja manningin í Vági at rógva við yngri og eldri børnum.

Er veðrið til vildar, verður eisini møguleiki hjá fólki at sleppa ein túr á fjørðin við vatnskutara.

### Opið hús

Um ársskiftið keyptu seks frítíðar- og áhugafeløg í Vági „Stóra Pakkhús", sum tað verður nevnt, á Gørðunum, til at hava ymiskt virksemi.

Tey seks feløgini eru Johanna, Felagið Garðabrúgv, Grindabátafelagið, Fornminnisfelagið, Kapproðrarfelagið og Nýggjársnevndin.

Kommunan stuðlaði keypinum fíggjarliga.

Í næstum verður húsið umvælt, og í hesum sambandi, og í samband við at Vágbingur verður flotaður, verður opið hús í Stóra Pakkhúsi leygardagin. Mayfinn Norðoy, arkitektur á Føroya Fornminnissavni, hevur gjørt tekning, sum húsið í verður umvælt eftir, og tær verða vístar fram í pakkhúsinum í dag.

Tá verður eisini greitt frá framtíðarætlanunum við húsinum.



*Hann fekk sítt ynskistarv:*

# Vil nú menna samvinnuna millum Føroyar og Bretland

*Nýggi bretski sendiharrin í Danmark hevur júst vitjað í Føroyum. Bretar bjóða sær til at hjálpa føroyingum við fyrireikingunum til fyrstu oljuleiting á landgrunninum*



*Philip Astley, sendiharrai og konan Suzanne. Mynd jan*

JAN MÜLLER

Nú um dagarnar vitjaði nýggi bretski sendiharrin í Danmark, Philip Astley í Føroyum fyri fyrstu ferð. Undir vitjanini nýttu hann og sendiharrafrúan, sum er donsk, høvi at vitja í Tinganesi, har tey hittu løgmann og varaløgmann. Her var m.a. spurningurin um framtíðarstøðu Føroya á skránni. Eisini gekk leiðin niðan til Ríkisumboðið umframt at vitjað varð hjá stovnum o.ø. eitt nú Oljumálastýrinum.

Nettupp Oljumálastýrið hevði ein serstakan áhuga fyri sendiharran, tí hann sær fyri sær stórar møguleikar fyri øktum samtarvi millum Føroyar og Bretland á oljuøkinum.

-Vit hava drúgvar royndir á hesum økinum, og eg haldi tað, at føroyskar og bretskar fyritøkur eiga at tosa saman um, hvat kundi verið samarbeitt um sigur Philip Astley, sum er sera fegin um, at marknaavtalan kom uppá pláss. Hann heldur, at nettupp henda avtalan er lykilin til at menna samvinnuna landanna millum.

-Eg komi til Føroya við einum ynski frá fyritøkum í míni landi, sum hava arbeitt í oljuvinnuni í mong mong ár. Hesar fyritøkur vilja fegnar arbeiða saman við føroyingum. Tað er heldur ikki av tilvild, at sendiharrin kemur til Føroya í kjalarvørrinum á upplatingini av BP Amoco skrivstovuni í Havn.

Philip Astley sigur, at bretskir oljumyndugleikar eru eisini sinnaðir til at geva føroyingum eina hjálpandi hond, tá tað ræður um at stíla fyri arbeiðinum í sambandi við fyrstu leitingini á landgrunninum. Hetta er nakað, sum bretar hava drúgvar royndir í.

Men talan er sjálvandi eisini um at fáa gott samstarv við alt tað føroyska vinnulívið og samfelagið sum heild.

Philip Astley heldur annars, at føroyskar fyritøkur lættliga kunnu koma í samband við ikki færri enn 60.000 fyritøkur í Bretlandi við at gera brúk av eini nýggjari kunningarskipan á internetinum. Tað ber til skjótt og lætt at koma í samband við fyritøkurnar. Talan er um TradeUK, sum er ein ókeypis internettænasta hjá bretsku stjórnini. Internetadressan er www.tradeuk.com.

Philip Astley hevur arbeitt í uttanríkisráðnum í London seinastu 5 árini. Hann hevur annars arbeitt á sendistovum í India, Pakistan, Eysturtýskalandi og Danmark.

Hann hevur verið rættiliga leingi í Danmark tilsamans og tí var sendiharrastarvið har eitt ynskiarbeiði. Tað telur eisini nógv, at konan Suzanne er donsk. - At tú kennir landið og málið hevur nógv at siga í einum tílíkum arbeiði vísir hann á.

Undir vitjanini hjá bretskum ráðharra í fjør varð Anfinn Kallsberg, løgmaður boðin til Bretlands at vitja. Vit spurdu sendiharran, nær henda vitjan verður veruleiki. Til tað sigur hann, at løgmaður skal vera vælkomin, tá hann heldur rætta løtan er til slíka vitjan.

